STUTT SAGT



*Kristian Zachariassen, granskari, vann í kappingini um WWF-virðislønina ímóti 80 øðrum fólkum úr eini 26 ymiskum londum*

## Kristian fingið WWF virðisløn fyri svartkjaftarist

**Í dag, 11. mai, hevur Kristian Zachariassen, granskari, fingið handað "runner up prize", sum er ein virðisløn frá WWF, World Wildlife Fund**

VIRÐISLØN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kristian hevur fingið virðislønina fyri arbeiði, hann hevur gjørt fyri at fáa sonevndu "Flexi-ristina" at rigga. Hetta er ein rist, sum skilir óynskta hjáveiði av toski og upsa frá undir troling eftir svartkjafti.

Arbeiðið, sum Kristian Zachariassen hevur gjørt, er í samstarvi við trolvirkið Vónina, Næraberg, Christian í Grótinum og felagið Nótaskip.

Tað er játtanin til Fiskivinnuroyndir og nótaskipini, sum hava fíggjað arbeiði við ristini.

**Fellir saman**

Virðislønin, sum Kristian hevur fingið, er skreytblað saman við 5.000 US-dollarum.

Sum skilst, vóru 80 onnur úr eini 26 ymiskum londum í uppskoti til virðislønina.

Kristian Zachariassen sigur, at fyrimunirnir við "Flexi-ristini" er, at hon fellir saman, tá ið hon kemur á dekkið, og hetta er ein fyrimunur í mun til aðrar ristir.

- Hetta ger, at ristin er løtt at arbeiða við, sigur granskarin, sum hevur fingið stóra heiðurin frá heimskenda felagsskapinum, WWF.

## Siloa-Kórið á Tvøroyri

Sunnudagin 14. mai kl. 15 fer Siloakórið undir leiðslu av Eyðun á Lakjuni at hava sangløtu í Skúlahøllini í Trongisvági

Limirnir í kórinum koma úr ymsum bygdum í Eysturoynni, men kórið hevur heimstað í Fuglafirði, og venjingarnar fara fram í samkomuhúsinum Siloa. Kórið telur umleið 40 sangarar, har størri parturin er ungfólk.

Á skránni hjá Siloa-kórinum er eitt rættiliga breitt úrval av sangum. Tey syngja bæði nýtt og gamalt, bæði sálmar og lættari rútmiskar sangir. Sungið verður bæði við og uttan ljóðføri. Solosangarar verða Elisabeth á Lakjuni, Karlina Højgaard og Kristina Bærendsen.

Tey gleða seg nógv at koma til Suðuroyar ein túr og vóna at síggja nógvar suðuroyingar til hesa sangløtuna sunnudagin 14. mai kl. 15

## Yggdrasil umborð á Høganesi

Í kvøld 11. mai verður konsert við bólkinum "Yggdrasil" umborð á sluppini Høganesi í Runavík. Umframt stovnararan av "Yggdrasil", Kristian Blak, ið spælir klaver í bólkinum, eru tónleikararnir á konsertini hóskvøldið Mikael Blak, bass, Heðin Ziska Davidsen, el-gittar, Brandur Jacobsen, trummur, og Kári Sverrisson, sang og kassagittar. Tónleikurin, ið er á skránni, eru nýggj løg hjá bólkalimunum, okkurt eldri verk hjá Kristiani Blak og løg, ið eru á fløguni "Risastova", ið "Yggdrasil" gav út fyrr í ár. Konsertin hóskvøldið byrjar kl. 20.

# Atlantsflog 10 mill. kr. í landskassan

**- Vit fegnast eisini um, at løgtingið hevur samtykt uppskotið um einskiljingina,og fara nú til verka saman við eigaranum at fremja hendan setning skjótt og væl, sigur Christian Andreasen, nevndarformaður í Atlantic Airways**

FLOGFERÐSLA
*Tíðindaskriv*

Atlantic Airways hevði aðalfund í farnu viku, har rokniskapurin var framlagdur. Úrslitið fyri skatt var 23,6 milliónir krónur, og tað er tað besta í søgu felagsins. Úrslitið eftir skatt gjørdist 20,7 milliónir krónur samanborið við stívar 14 milliónur krónur árið fyri. Tað svarar til ein vøkstur uppá 46 prosent.

Landskassin fær eisini lut í yvirskotinum, tí aðalfundurin hevur samtykt,eftir uppskoti frá nevndini, at rinda 10 milliónir kr. í vinningsbýti.

Talan er um sera stóran vøkstur í virkseminum, tí umsetningurin vaks við heili 62 prosentum úr 234 milliónum í 2004 upp í slakar 380 milliónur krónur í 2005.

Virksemið vaks nógv bæði úti og heima. Inntøkur, sum stava uttanlands frá, vuksu úr 74 milliónum upp í slakar 129 milliónir. Hetta svarar til, at 36 prosent av inntøkugrundarlagnum liggur uttan fyri Føroyar og í ferðavinnuni. Mesti vøksturin uttanlands stavar frá flúgving í Noregi.

Hóast búskapurin tóktist stagnerandi stóran part av 2005, og felagið var stórt sæð einsamalt um allan flutningin loftvegis millum Føroyar og útlond, so var metstórur vøkstur á Føroyaleiðunum. Mongu og spjaddu fráferðirnar saman við bíligari prísum og smidligari prísskipan, eiga sín stóra lut í hesum vøkstri.



*Christian Andreassen, nevndarformaður í Atlantsflog*

Nevnd og stjórn fegnast um tað góða úrslitið, og at tað samstundis hevur borið til at gera tað møguligt fyri føroyingar at ferðast oftari. Starvsfólkaliðið hjá Atlantic Airways, sum taldi 152 fólk í 2005 í mun til 111 árið fyri, eiga øll sín stóra lut í hesum.

- Vit fegnast eisini um, at løgtingið hevur samtykt uppskotið um einskiljingina,og fara nú til verka saman við eigaranum at fremja hendan setning skjótt og væl, sigur Christian Andreasen, nevndarformaður í Atlantic Airways.

Umframt nevndarformannin Christian Andreasen sita í nevndini Erlingur í Líða og Petur J. Eiriksson, sum eru valdir av landsstýrinum og Annika Jespersen og Heini Davidsen, sum starvsfólkaumboð.

# Atlantsflog á rættari kós

FLOGVINNA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

- Tað er sera gleðiligt, at tað gongur væl at tað gongur væl hjá Atlantsflog , og at teirra flúgvitímatal veksur ár fyri ár og úrslitið harvið eisini verður betur. At tey at hava latið tí almenna vinningsbýti er eisini prógv um, at Atlantsflog er á rættari kós sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, nú føroyska flogfelagið hevur avgjørt at lata landskassanum 10 mill. kr í vinningsbýti.

Landsstýrismaðurin vísir á, at nú Atlantsflog er farið inn í eina einskiljingargongd, har tey hava fingið skotið inn bæði hangar og tyrlu og eginognin tí eisini er vaksin nógv, merkir tað, at landið tann vegin heldur tað er skilagott, at felagi letur ein part av yvirskotinum sum vinningsbýti til eigaran.

Bjarni Djurholm heldur lykilin til at tryggja Atlantsflogi eina góða framtíð vera, at felagið nú verður lutvíst privatiserað. Í hesum døgum verður so lýsing send til bløðini, har søkt verður eftir ráðgevum at fyrireika søluna av teimum 33% av Atlantsflogi. –Vit síggja hesa einskiljingargongd sum eina fortreyt hjá Atlantsflog at kunna kappast á jøvnum føti við eitt annað felag, sum føroyingar eiga. Annars kann Atlantsflog koma í ta støðu, sum tað var í gomlum døgum, har Atlantsflog verður tann stóri og FaroeJet tann lítli, og so kemur sympatiur fyri tí lítla. Tí er tað neyðugt at tryggja, at føroyingurin eigur í Atlantsflog.



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, heldur lykilin til at tryggja Atlantsflogi eina góða framtíð vera, at felagið nú verður lutvíst privatiserað*

Mánadagin byrjar FaroeJet flúgving, og landsstýrismaðurin ynskir felagnum eina góða framtíð. -Tað, sum er gott fyri borgaran, er eisini gott fyri samfelagið. Har tað er kapping fær man eisini betri møguleika at staðfesta, hvat er rætti prísurin. Kappingin hevur altíð tað við sær, at tú sum borgari kanst velja. Tí er tað serstakliga gleðiligt, at vit nú fáa eitt felag, sum er kjølfest við føroyskum íleggjarum, so føroyingar eisini kenna seg heima í hesum felagnum. Soleiðis at vit fáa eina støðu í uttanlandsflúgvingini, har vit kunnu síggja fram til, at brúkarin kann velja ímillum Atlansflog ella FaroeJet.

# Reyða keylan gongur leys

**Fríggjakvøldið fara tey undir nýtt tiltak í Bowlinghøllini í Havn**

BOWLING




Bowlinghøllin í Havn hevur hvørt hóskvøld eitt tiltak, tey kalla »Reyða keylan«, og flest øll sum ganga í bowlinghølllini vita, hvat hetta merkir. Komandi fríggjakvøld fara tey to at royna nakað nýtt.

Tiltakið verður nevnt »Tann reyða keylan gongur leys í Bowlinghøllini«, og er hetta fyrstu ferð, at tílíkt verður roynt í Føroyum.

Tiltakið er ikki ókent í útlondunum, og hava gestirnir í want2bowl í Tåstrup rættuliga tikið tiltakið til sín. Hugskotið sprettur úr ynskinum at seta futt í vikuskiftini, og verður tað James Olsen sum kemur at standa fyri hesum partinum.

James fer at ganga millum gestirnar og við sínum lætta lyndi koyrir hann á og setur stemningin í top. Eisini fer hann at avgera, nær teir ymisku suprise vinningarnir, sum ætlanin er at luta út, kunna vinnast.

Starvsfólkini í Bowlinghøllini eru spent til tiltakið og vóna at gestirnir taka væl ímóti hesum nýggja tiltaki.